













*Tað er ikki óvanligt, at djór verða avlívað, av tí at tað ikki riggar ímillum tey og húsfólkið. Atvoldin kann vera, ,at onkur í familjuni er viðkvæmur og ikki tolir djórið. Ella tann at fólk hava fingið sær eitt húsdjór, sum ikki hóskar til tey*

*Í dag fara fólk vanliga til djóralæknan, tá ið djór skulu avlívast. Tað er ikki lætt at fara við sínum góða vini; men ofta gerst ikki annað. Djór kunnu blíva so gomul og sjúk, at tað er synd í teimum, og tey mugu avlívast. Tá mást tú spyrja teg sjálvan, hvørjum tað er synd í, djórinum ella tær sjálvum*